

## Fiskaprísirnir fara upp

Ta seinastu tíðina eru fiskaprísirnir farnir spakuliga uppeftir, skrivar Fiskaren. Teir høgu oljuprísirnir eru ein ørsøk til, at prísirnir fara upp. Nógvastaðni - bæði í Ruslandi, Chile, Norra, Íslandi, Japan, Canada og her hjá okkum liggja stórir partar av fiskiflotanum av teirri einfaldu orsøk, at tað loysir seg ikki at fiska, tá ið oljuprísurin er so høgur. Goymslurnar í Kina eru eisini um at tømast, tað fer væntandi eisini at ávirka fiskaprísin. Í USA hava stór búnaðarøki fyrr í summar ligið undir í vatni, tað fer at gera, at teirra framleiðsla verður munandi minni enn fyrr mett. Tá hugsað verður um fiskamjøl, so er alneyðugt at prísirnir á soya og raps, eisini fara upp, tí sum vituligt er, so kappast fiskamjøl altíð við tær búnaðarvørurnar. Eisini verða prísirnir ávirkaðir av dollaranum, serliga síðani fiskamjøl og olja verða handlað í dollarum. Tá prísurin á fiskamjøli fór upp fyri tveimum árum síðan, skiftu nógvir bøndur, sum nýta mjøl til fóður, frá fiskamjøli til soya, raps og mais. Nú sær út til at prísirnir á fiskamjøli aftur eru kappingarførir, við búnaðarvørurnar, skrivar FF Skagen í síni nýggjastu útgávu.

Heðin og Heðin:

# Óruddið skal burtur

**Umhvørvisátakið hjá Sosialinum, Heimsins reinasta oyggjaland, hevur havt stóra ávirkan, og heili tvær kommunur hava tikið átakið til sín og eru farin at rudda.**



*Órudd á Oyrabakka í Sunda kommunu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

UMHVØRVI

*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

Fyri einum mánaða síðan gjørdi Sosialurin eitt umhvørvisátak, Heimsins reinasta oyggjaland, har kannað varð, um Føroyar veruliga eru heimsins reinasta oyggjaland. Myndir eru tiknar frá almennum vegum, har rusk og órudd sæst. Myndirnar hava verið regluliga í blaðnum, og eisini í dagsins blað á síðu 16-21.

### Kommunur rudda

Tórshavnar- og Sunda kommuna hava tikið átakið til og hava sett átak í verk í kommunum. Kommunurnar hava sett í verk eina umhvørvisverkætlan, har øll almenn øki og øki hjá kommununi skulu vera ruddað innan eina tíðarfreist. Tíðarfreistin hjá Tórshavnar kommunu fór 7. juli. Fyrsta átakið hjá kommuni var at burturbeina bilar uttan nummarplátu. Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at hann skilur als ikki, at borgarin ikki burturbeinir óbrúkiliga bilin, hóast hann fær 4000 kr. fyri, um hann fer niðan á brennistøðina.

### Ongar nummarplátur: burtur

Nú freistin er farin, koyrdu vit í gjár runt kommuna at vita, hvussu støð til við óruddinum. Hóast nakrir bilar standa eftir, ið nú verða burturbeindir, má eg siga, at eg haldi, at lýsingarnir hava ávirkað. Fólk hava longu verið runt og burturbeint bilarnar, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu. Allir bilar í Tórshavnar kommunu uttan nummarpátur verða tiknir komandi dagarnar.

- Eg eri imponeraður av, at so nógv longu er tikið burtur, sigur borgarstjórin.

### Náttúran skal eisini ruddast

Næsta stigið hjá Tórshavnar kommunu verður at fáa óruddið burtur úr náttúruni.

- Vit fara eisini at lýsa við hesum og seta eina freist á. Umhvørvisdeildin fer síðan at boða frá, at órudd skal takast burtur ymsastaðni, um eigarin ikki hevur gjørt tað áðrenn. Eg haldi tað vera eitt frálíkt átak, Sosialurin er komin, tí at myndir siga so nógv, og vit skulu taka hetta til okkum og vera jalig og rudda. Heðin Mortensen sigur eisini, at tað altíð er nóg mikið at burturbeina, og tí skulu læra av hesum og beina burtur beinanvegin.

Sunda kommuna arbeiðir eisini við einari umhvørvisverkætlan.

### Sunda kommuna burturbeinir

- Vit arbeiddu við hesum, áðrenn Sosialurin kom við átakinum. Vit hava spurt okkum fyri, hvat mannagongdin er. Á myndunum hjá Sosialinum er alt ikki órudd – tað er bara útgerð, ið er tveitt ymsa staðni, so tað sær út sum órudd. Vit hava sett eina lýsin í bløðunum, um at fólk, ið hava órudd á økjum hjá Sunda kommunu, skulu burturbeina hetta áðrenn ólavsøku. Tað er fleiri, ið longu hava sett seg í samband við okkum, ið fara at burturbeina, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Sunda kommunu.

### Óruddarin gjaldar fyri ruddingina

- Um eigarin ikki ruddar áðrenn ásettu tíðina, fer kommunan inn at rudda, og eigarin kemur at gjalda fyri ruddingina, sigur borgarstjórin.

- Vit fara í framtíðini at gera so, at vit gera ein leigusáttmála við tey, ið leiga øki frá Tórshavnar kommunu, har tey hava ábyrgdina av at hava økið ruddiligt, men um hetta ikki verður hildið, fer kommunan eisini her inn og ruddar, og eigarin gjaldar, siður Heðin Zachariasen.

- Vit kunnu sjálvandi ikki fara inn á privat øki og siga, hvat tey skulu gera, men vit hava givið teimum eina áheitan um at rudda, sigur borgarstjórin.

### Kommunan meinar tað

- Vit ætla okkum at halda, tað vit lova, og alt skal ruddast. Vit meina nakað við tað. Vit koma eisini at stramma mannagongdirnar upp viðvíkjandi vinnulig virksemi, ið leigar frá kommununi. Fleiri hava longu boðað okkum frá, at tey fara at burturbeina órudd, sigur borgarstjórin í Sunda kommuni, Heðin Zachariasen.

- Vit ætla at liva upp í lýsingina: óruddið skal burtur.